## Stórsigur til FCK

FC Keypmannahavn vann ein tryggan 4-0 sigur á Norðurírska liðnum Cliftonville. Hjalte Bo Nørregård legði FCK á odda, áðrenn útlendsku leikararnir hjá danska liðnum tóku yvir. Brasilumaðurin José Junior gjørdi tvey mál meðan, Zdenek Pospech úr Kekkia gjørdi eitt. FC Keypmannahavn spældi dystin á útivølli, og sambært danska Ekstra Bladet, vóru 800 áskoðarar til dystin.



## Levi Hanssen fekk Johnson

EB/Streymaleikararnir spiltu ikki tíðina burtur eftir dystin í gjár. Fleiri teirra býttu um leikbúna við Manchester City-leikararnar. Á myndini síggja vit Levi Hanssen koma úr umklæðingarrúminum hjá Manchester City eftir dystin, og hevur hann skift um troyggju við miðvallarleikaran Michael Johnson. Tað tykist havnarmaðurin í EB/Streymi eftir øllum at døma at vera glaður um.

# rð ein uppliving



*Arnbjørn Hansen slapp heilt nær, tá hann hegnisliga setti Richard Dunne av og royndi seg við skoti*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

### EB/Streymur nærkaðist

Seinni hálvleikur byrjaði munandi betur fyri EB/Streym. Bárður Olsen sendi eitt ávaringarskot avstað, tá hann royndi seg við fríspark úr 25 metrum, sum Joe Hart í málinum ikki megnaði at halda, men misti út til hornaspark.

Og satt at siga gingu fyrstu 20 minuttirnir av seinna hálvleiki, uttan at Manchester City hevði nakað trýst á EB/Streym sum so. Gaman í, leiðslan var í tryggum hondum, og tískil var eingin grund til at pøsa seg óneyðuga nógv.

Teir hildu tó EB/Streym frá sínum málið. Eitt stuttligt dømi um, hvussu langt burtur EB/Streymur var frá veruligum málroyndum var, tá Fróði Clementsen royndi úr 35 metrum, og flennandi mátti ásanna, at hann helst var dekan ov bjartskygdur við skotroyndini.

Hinvegin slapp Arnbjørn heilt nær, tá hann hegnisliga setti Richard Dunne av við eini hælfintu, men orkan var uppi, tá hann endiliga slapp at skjóta.

### City er víðari

At dysturin endaði við tvey málasigri til gestirnar, kunnu teir í EB/Streymi vera glaðir um. Bæði tí, at tað er eitt flott úrslit at hava við sær, og eisini tí, at tapið kundi verið størri. Hinvegin er sigurin hjá Manchester City so mikið stórur, at EB/Streymur hevur spælt av við allar kjansir – um teir nakrantíð høvdu nakran – um at koma víðar.

Størsta avbjóðingin, sum nakað føroyskt lið hevur verið úti í, stendur nú eftir sum ein uppliving hjá leikarunum. Ein positiv uppliving!

# Taka einki fyri givið

**Vit vilja sjálvsagt fegnir vinna tann seinna dystin eisini, men EB/Streymur vísti í dag, at teir kunnu skapa eina sensasjón, um hepnið er við teimum, sigur Dietmar Hamann, sum var annar av málskjúttunum á Tórsvølli í gjár**

FÓTBÓLTUR
*Uni Holm Johannesen*
*uni@sosialurin.fo*



*Vit vilja sjálvsagt fegnir vinna tann dystin, men EB/Streymur vísti í dag, at teir kunnu skapa eina sensasjón, um hepnið er við teimum, sigur Dietmar Hamann*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Við flottum langskoti skoraði Dietmar Hamann til endaliga úrslitið á Tórsvølli í gjár. Týski miðvallarin var eisini væl nøgdur eftir dystarlok.

- Hetta var fínasta slag. Dysturin var ein samanrenning av venjingardysti og beinleiðis týdningarmiklum dysti. Mótstøðan var ikki tann størsta, men hetta er frálík fyrireiking til eitt langt kappingarár, sigur Dietmar Hamann.

Hvør er tín meting av EB/Streymi?

- Teir stríddust væl, og í seinna hálvleiki vóru teir munandi meira við í dystinum. Teir høvdu ymsar deyðbóltsstøður, sum teir kundu fingið meira burturúr. Vit tryggjaðu okkum eitt gott útgangsstøði, men vit mugu framvegis fara inn í seinna dystin við røttum hugburði. Vit vilja sjálvsagt fegnir vinna tann dystin, men EB/Streymur vísti í dag, at teir kunnu skapa eina sensasjón, um hepnið er við teimum, sigur Dietmar Hamann, annar av málskjúttunum hjá Manchester City.

# Treivst væl millum Richards og Dunne

*Peter Foldgast stóð seg sera væl millum ensku stjørnurnar í gjár*

*Mynd: Jens Kristian Vang*



**- Ja, teir eru ikki bara soleiðis at flyta. Eg var eisini rættiliga troyttur til síðst, sigur Peter Foldgast um tveir av mótstøðumonnunum á Tórsvølli í gjár**

FÓTBÓLTUR
*Uni Holm Johannesen*
*uni@sosialurin.fo*

Peter Foldgast stóð seg sera væl millum ensku stjørnurnar í gjár. Tað sást týðiliga, at hann hevur roynt seg á hægri støði áður. Við mótstøðumonnum í rygginum megnaði hann at varðveita bóltin, og sleppa av við á skilagóðan hátt.

Tað var tó ikki sítt egna avrik, sum Foldgast frøddist um eftir dystin – liðavrikið var ótrúligt.

- Hetta var frálíkt. Vit spældu við í løtum, og hugburðurin var fantastiskur. Vit stóðu væl í verjupartinum. Eg vil tó ikki ikki siga, at úrslitið kemur óvart á meg – men flott avrik. Nú mugu vit bara syrgja fyri at varðveita spælið til landskappingina.

Tú sá út til at trívast millum Richard Dunne og Micah Richards?

- Ja, teir eru ikki bara soleiðis til at flyta. Men teir eru nú ikki annað enn menniskju, sum spæla á væl hægri støði. Eg var eisini rættiliga troyttur til síðst, sum eisi-ni var orsøkin, at eg var útskiftur, sigur Peter Foldgast.